# Viljin drívur verkið

**–Eg haldi ikki, at mann eigur at klaga yvir sína útbúgving. Er tað ov kostnaðarmikið ella passar tað ikki til ein, so ber altíð til at royna okkurt annað stað, sigur Eystein Elttør, sum í summar verður liðugur við sína honours degree á Robert Gordon University í Aberdeen. Hóast kostnaðurin er nógvur, so trívist hann óføra væl**

ÚTBÚGVING/ SAMRØÐA
*Heri á Rógvi*

Aberdeen: Eystein Elttør situr í hesum døgum og fyrireikar seg til endaspurtin á sínari útbúgving. Hann er lesandi við Robert Gordon University í Aberdeen. Útbúgvingin hjá honum kallast fyri Business Studies, og hon er mest at líkna við økonomi lesnaðin eftir donskum mátistokki, har dentur verður lagdur á búskap, umsiting og leiðslu.

Hetta er triðja árið hjá honum í Aberdeen og hjá Robert Gordon University. Heitið og útbúgvingin, ið Eystein í hesum døgum strembar eftir, er honours degree í Business Studies. Í orðabókini stendur at lesa, at ein honours degree er eitt B.A. (bachelor) heiti, ið verður latið eftir ávísan serlestur.

Tað tekur fýra ár at fáa snøgga honours heitið. Orsakað av, at skúlaskipanin í Bretlandi er øðrvísi í Føroyum, so fara fólk aloftast á universitet sum 17-18 ára gomul, og hetta ger, at støðið tað fyrsta árið ikki er heilt at javnmeta við fyrsta árið á eitt nú einum donskum universiteti. Soleiðis gjørdist møguligt hjá Eystein at sleppa undan at ganga fyrsta árið, tí hann hevði savnað sær neyðuga førleikan aðrastaðni. Útbúgvingin hjá Eysteini er soleiðis háttað, at triðja árið fara tey lesandi út til fyritøkur at arbeiða. Hetta er eitt sereyðkenni við júst hesari útbúgvingini. Eystein heldur hetta árið vera eitt tað læruríkasta og týdningarmiklasta av øllum.

– Hetta árið fekk eg veruliga møguleikan at royna meg. Tað er annað lív, tá tú fert av skúlabeinkinum, og tá fært tú veruliga gjørt tær nakrar royndir, og samstundis gjørt tær eina betri mynd av, hvussu vinnulívið veruliga virkar, heldur Eystein.

Eystein var so mikið heppin, at hann fekk boðið pláss hjá fleiri oljufeløgini. Frammanundan hevði hann avgjørt, at tað var oljufeløgini, ið høvdu hansara stóra áhuga, og hann hevur eisini í lesnaðinum lagt seg nógv eftir oljuvinnuni. Endin gjørdist, at hann og konan fóru til mæta stórbýin London, har Eystein fór í starv hjá Texaco.

– Hetta var veruliga eitt stórt upplivilsi. Teir tóku sær av at skaffa okkum eitt gott stað at búgva, og eg fekk veruliga møguleikan at royna meg, og teir høvdu so mikið stórt álit á mær, at eg fekk innlit í týdningarmiklar sakir, og eg skuldi arbeiða við týðandi avgerðum og raportera beint til stjórarnar, sigur Eystein.

Eystein var eisini í starvi hjá teimum, tá tað gjørdist greitt, at teir ikki fingu lut í fyrsta útbjóðingarumfari í Føroyum.



*Tað er nógv arbeiði í sambandi við lesnaðin hjá Eysteini. Hann brúkar ógvuliga nógva tíð frammanfyri telduni við bókunum.*

*Mynd: Heri á Rògvi*

– Teir vóru ógvuliga professionellir, og eg kom á ongan hátt at merkja misnøgd ella annað, tí eg var føroyingur, sigur Eystein Elttør.

Eftir árið í London vendi hann aftur til Aberdeen og Robert Gordon University, har hann nú stríðist við at gera seg lidnan við útbúgvingina.

## Mentanarbroyting

Tann higartil nógv umtalaði høvuðspersónurin í søguni er 27 ára gamal og klaksvíkingur. Á einari síðugøtu til høvuðsgøtuna í Aberdeen, Union Street, búleikast lesandi klaksvíkingurin í Aberdeen. At síggja til eru húsini ikki nøkur glæsilig sjón. Tað fyrsta, ið møtir tær, tá tú trínur inn um eru eisini hesi teppini, ið skotar tykjast hava ein ógvuliga løgnan tokka til. Trappurnar eru gamlar, og tær virka meira sum um, at tær fara at detta saman enn nakað annað.

Eftir styttri gonguferð í trappunum møtir mær ein meira frískligur litur frá einari íbúð, og Eystein heilsar mær vælkomnum. Her er á meira enn ein hátt meira føroyskt. Í føroyskum tropum í Aberdeen sessast vit til eitt prát.

Eystein hevur sum sagt verið í Aberdeen tvey ár umframt árið í London. Hann er sonur føroyska oljuminastaran og eigur eina ikki minni kenda konu í Tóru við Keldu. Hon býr í løtuni íFøroyum, men hon hevur eisini verið í bæði London og Aberdeen. Áðrenn Eystein byrjaði á Robert Gordon hevur hann gingið á handilsskúla, verið sjómaður og arbeitt á Hotel Føroyum.

Sum heild sigur Eystein, at hann hevur havt rættiliga lætt við at venja seg við at liva í Skotlandi og Aberdeen. Tað er bara tað føroyska breyðið, ið hann saknar, men tað eru ráð fyri tí, og hann er nevniliga sjálvur farin at baka breyð.

– Fólkið her er ótrúliga fitt, og eg havi havt lætt við at koma í samband við fólk, og veðrið er ikki stórt øðrvísi enn tað, ið eg eri vanur við, sigur Eystein.

Tey nógvu gráu húsini eru eisini vorðin ein partur av dagligdegnum hjá Eysteini. Hann sigur seg halda saman við bæði skotum og føroyingum. Hann gongur á einari samkomu í Aberdeen, har hittir hann eisini nógv fólk, og teir, hann lesur saman við, eru eisini óføra fittir at vera saman við.

## Kostnaðarmikið

Tað er ikki ókeypist at ganga í skúla í Bretlandi. Sum borgarar uttanfyri ES skulu føroyingar av við góð 7.000 pund fyri árið á Robert Gordon Univertsity. Hetta svarar til einari 85.000 kr. um árið. Sum støðan er nú, letur landið 60.000 kr. í stuðuli, og føroysk lesandi hava eisini rætt til SU. Afturat á kostnaðarsíðuni koma so aðrar útreiðslur, sum íbúð og matur. Eystein má av við fleiri túsund krónur í leigu hvønn mánað.

Hóast Eyðstein var greiður um hetta, so helt hann seg ikki aftur við at fara til Skotlands.

– Eg hevði hoyrt nógv gott um Robert Gordon University. Samstundis vildi eg fegin læra meg enskt, so eg valdi at søkja, og eg slap inn, sigur Eystein.

– Nógv tað torførasta var at søkja. Eg mátti gera alt sjálvur uttan at fáa hjálp



*Eisini í Aberdeen finna vit eina Hebron-samkomu. Her plagar Eystein at vitja, og hann hevur hitt nógv fólk í samkomuni.*

*Mynd: Heri á Rògvi*

nakrastaðni frá, og fyrst søkti eg eisini til skeivt universitet, og tað var sum heild rættiliga torført at fáa alt í rættlag, sigur Eystein.
Eystein dylur heldur ikki fyri, at hann helst vil arbeiða í oljuvinnuni, har hann eisini hevur savnað sær royndir. Í løtunin arbeiðir hann eisini við einari høvuðsuppgávu um sama evnið.

– Sæð yvir eitt longri tíðarskeið, ætli eg mær aftur til Føroya, men fyribils er tað óvist, hvar framtíðin hjá mær liggur, sigur Eystein.

## Strævið og gott

– Eg haldi ikki, at mann eigur at klaga yvir sína útbúgving. Er tað ov kostnaðarmikið ella passar tað ikki til ein, so ber altíð til at royna okkurt annað stað, sigur Eystein Elttør.

Hann vísir á, at tað stundum er strævið at ganga á universitetinum. Ein dagin sat hann frá kl. ellivu á morgni til næsta morgun út í eitt og arbeiddi við einari uppgávu. At byrja við hevði hann stóran tørv á orðabókini, tá hann las fakið hjá sær, tí talan er um fakmál ið hann fremmandafólk ikki hava eins gott innlit í, men nú gongur strúkandi við tí enska. Útbúgvingarvalið er hann eisini ógvuliga fegin um, tí hetta gevur honum fjølltáttaðar arbeiðsmøguleikar.

– Eg vil ráða øllum til at leita útum Danmark, tá tey fara at velja sær útbúgving, sigur Eystein Elttør at enda.



*At ganga á pub er partur av mentanini í Skotlandi. Ung sum gomul leita sær á pub, og Eystein heldur talan vera um eina ógvuliga sosiala mentan.*

*Mynd: Heri á Rògvi*



LLM lestnaður á universitetinum í Aberdeen:

# Ein avbjóðing- bæði útbúgvingarliga og mentanarliga

ÚTBÚGVING
*Kitty May Ellefsen, Cand merc jur. og stud. LLM,*



The University of Aberdeen
Í 1495 meðan Kolumbus ferðast víða um høv og opinberaði ta nýggju verðina, var Elpinstone biskopur, sum so mong onnur í Europa um hettar mundi, inspereraður av tí nýggju læruni hjá Kolumbusi. Hetta førdi við sær, at hann stovnaði Kings Collage, sum seinni varð fundamenti undir universitetinum í Aberdeen.

Universiteti í Aberdeen liggur í tí gamla býarpartinum og karmurin um universiteti eru nakrir gamlir bygningar, sum minna mest av øllum um nakrar gamlar kirkjur ella gomul slott. Men lat ikki tí gomlu, romantisku fasaduna lumpa nakran. Innanfyri múrarnar fjalir eitt modernað universitet seg við øllum nútímans hentleikum. Meira enn 1000 teldur til ókeypis nýtslu fyri tey lesandi, stór bókasøvn við yvir 1.505.000 bókum og meira enn 6.000 journalum og tíðarritum, fleiri granskingardeplar, yvir 150 ítrótta og sosialir felagsskapir, har lesandi kunnu hugna sær í frítíðini.

Universiteti útbjóðar eina ørgrynnu av lærugreinum. ”You name it” og tú skalt nokk finna lærugreinina, ið tú leitar eftir. Sum dømi kann nevnast: Løgfrøði, medisin, theologi, techonologi, management, business, ecologi, sálarfrøði, heimspeki, anthropologi, sosiologi og mangt annað.

À universitetinum gingu í 2001 10,788 næmingar. Av hesum tóku 9.091 eina undergraduate degree, ella sum vit á okkara leiðum kalla bachelor, og 1,697 tóku eina master degree.

## LLM útbúgvingin

LLM útbúgvingin ella Master of Law, sum tað so rætt kallast, er ein av teimum mongu útbúgvingunum, sum møguleiki er fyri at lesa á universitetinum í Aberdeen. Universiteti hevur drúgvar og meira enn 500 ára gamlar royndir í at undirvísa og granska í løgfrøði. Lógardeildin er kend fyri sína vítt fevnandi gransking, og varð í 2000 nummar 5 á listanum hjá “Reserch Assessment Exercise” yvir gransking og góðsku í Stóra Bretlandi.

Lógardeildin hevur sítt egna bókasavn, sum fevnir um keldur úr nærum øllum heiminum.

Á bókasavninum er eisini eitt “European Documentation Centre”, ið gevur atgongd til løgfrøðiligar bókmentir innan EU. Umframt bøkur, journalir, reviews og lógarsavn, er eisini atgongd til teir kendu løgfrøðiligu alnet dátábasurnar Lexis og WestLaw.

Á LLM útbúgvingini kanst tú velja millum sjey serlinjur. Hesar serlinjur eru: 1. LLM Commercial Law, 2. LLM Criminal Justice 3. LLM Criminal Justice and Human Rights 4. LLM European Law 5. LLM International Law 6. LLM International and European Law 7. LLM Property Law.

Fyri at fáa LLM prógvið skal tann lesandi standa fýra lærugreinir, har tríggjar skulu takast innan fyri valdu sergrein. Fyri at standa lærugreinirnar, skal tann lesandi lata inn og standa tvær assignments (uppgávur) fyri hvørja lærugrein. Harafturat er ein skrivlig próvtøka í hvørjari lærugrein. Tann lesandi skal eisini standa eina granskingar grein. At enda skal ein dissertation (høvuðsuppgáva) skrivast innan okkurt øki, ið tann lesandi sjálvur velur, men sum vegleiðarin skal góðkenna. Í alt tekur útbúgvingin 1 ár. Byrjast kann í september ella januar.



*Ein av meira stásiligu bygningunum hjá Aberdeen University.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

## Dygd fyri pengarnar

Fyri ein borgara, sum ikki er limur í EU, er LLM útbúgvingin ikki lítið kostnaðarmikil. Føroyar eru sum kunnugt ikki limir í EU, og tí mugu føroyingar gjalda fult gjald ella tað, sum kallað verður “overseas tuition”. Fyri LLM útbúgvingina er gjaldið 7.020 £, ið svarar til umleið 84.000 kr. Av hesum veitir Stuðulsstovnurin 60.000 kr. í stuðli.

Afturat lestrargjaldinum koma bøkur og annað tilfar, ið tann lesandi noyðist at ogna sær, og so sjálvandi eisini búðstaðar kostnaður og annað. Men miss ikki mótið - tað ber til at søkja um stuðul frá fleiri fondum. Og SU veitir stuðul til útbúgvingina - um tú also hevur nøkur klip eftir frá lestrartíðini í Danmark!!!

Tað, at útbúgvingin er kostnaðarmikil, er ivaleyst við til at geva tí lesandi dygd fyri pengarnar. Flokkarnir eru smáir, eini 5 til 12 næmingar í hvørjum flokki. Hetta viðførir eitt tætt samband millum professaran og tann einstaka næmingin. Næmingurin skal sjálvur taka aktivan lut í undirvísingini, tað verið seg við diskutionum ella, at næmingurin verður biðin um at greiða frá einum ávísum evni. Tað, at næmingarnir koma úr ymiskum londum við ymiskum rættarskipanum og lógum, ger, at orðaskiftinik ofta eru sera áhugaverd og gevandi. Um ein hevur hug og tíð, er eisini møguleiki fyri at ganga til stórfyrilestrar á universitetinum, har gestir, professarar og næmingar hava fyrilestrar um ymisk evni.

Afturat skal nevnast, at um tú hevur gjoldið “overseas tuition” kanst tú taka øll tey málskeið í enskum, sum tú hevur hug og tíð til, uttan at gjalda eyka fyri hesa tænastu. Máldeildin á universitetinum hevur eitt stórt úrval av málskeiðum.

## Nógv fólkasløg møtast.

Eitt tað mest áhugaverdara við at lesa á universitetinum á Aberdeen, aftaná løgfrøðina sjálvandi, er eftir mínari metan, øll tey ymsu fólkasløgini, ið har møtast. Í 2001 vóru 115 tjóðir umboðaðar á universitetinum. Í 2001 byrjaðu 80 LLM lesandi. Herav vóru bert fimm, ið komu úr Stóra Bretlandi. Restin kemur stórt sæð úr allari verðini. Hettar er við til at gera umhvørvið sera áhugavert og gevandi. Afturat tí fakligu vitanini, ið ein hevur møguleika fyri at ogna sær á universitetinum, fær ein tann mennandi møguleikan at læra onnur fólkasløg og aðrar mentanir at kenna. Av tí at øll eru í einum fremmandum landi er sera lætt at knýta nýggj vinarbond, og longu eftir stutta tíð vórðu tey knýtt líka frá Føroyum til Kina, til Ruslands, USA, Venuzuela, ja sjálvt til Kasakstan.

Sum dømi um ein langfaralesandi kann eg nevna Nataliya Drozdova. Hon kemur úr Russlandi, har hon hevur tikið lógfrøðisligt embætisprógv á Ivan Franko Lviv State Universitetinum í 1998. Eftir lokna útbúgving var vónleyst at fáa starv hjá henni í heimlandinum. Tí valdi hon at koma til Stóra Bretland fyri tveimum árum síðani. Um hetta mundið dugdi hon ikki at siga ein heilan setning á enskum; men sum tann arbeiðshesturin hon er, gekk hon til enskt undirvísing, meðan hon hevði trý ymisk arbeiði fyri at samla tey 7.020 £ saman, sum útbúgvingin kostar. Ì dag tosar og skrivar hon flótandi enskt og hevur góð útlit fyri at fáa starv eftir lokna útbúgving. Hennara ynski er at fáa starv hjá einum enskum oljufelag soleiðis, at hon fær møguleika fyri at vera verandi í Aberdeen. Heima í Russlandi eigur hon eina 3 ára gamla dóttir, ið hon ætlar at taka til Aberdeen, um hon fær arbeiði her. Good luck, Nataliya, ynski eg henni.



*–Í 2001 vóru 115 tjóðir umboðaðar á universitetinum. Í 2001 byrjaðu 80 LLM lesandi. Herav vóru bert fimm, ið komu úr Stóra Bretlandi. Á myndini sæst flokkurin hjá Kitty May, har tað ikki er mangul upp á nationalitetir.*

*Mynd: Kitty May Ellefsen*

## Hægri útbúgving í Danmark er ikki einasti møguleikin

Tá ein hevur lisið eina tíð í Aberdeen kemur tað einum til hugs, at tað er ikki ein sjálvsøgd sjálvfylgja, at stórt sæð allur hægri lesnaður hjá Føroyingum skal verða í Danmark.

Tað er eingin ivi um, at hægri lærustovnarnir í Danmark eru dygdar skúlar, ið eisini njóta altjóða viðurkenning. Men á ein ella annan hátt er tað sum um, at tá vit føroyingar hugsa um útlond, so strekkjur hugaheimurin seg ikki nógv longur enn til Danmarkar. Í so máta tykist tað sum um okkara sterku bond til Danmarkar eru eitt haft, meira enn ein fyrimunur.

Eg eri avgjørt samd við teimum, sum halda, at vit eiga at hyggja aðrar vegir enn til Danmark, tá vit senda okkara ungu avstað í lestrar ørinum.

Fyri eitt lítið land sum Føroyar skuldi tað verið ein fyrimunur, at ungdómur okkara fær fjølbroyttar útbúgvingar, ikki bert úr Danmark, men eisini aðrastaðni frá. Hetta vil verða við til at styrkja um altjóðagering okkara, ið er so týdningarmikil í tíðini vit liva í. Og Aberdeen liggur bert 1 tíma við flogfari úr Føroyum; og tí betur, so kann nú flúgvast til Skotland alt árið.